Fra: Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>
Dato: torsdag den 25. februar 2021 kl. 11.43
Til: Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>
Cc: Jákup Eyðfinn Kjærbo <jek@fmr.fo>
Emne: Trupulleiki við meirvirðisgjaldslógini § 3 c.

Til Fíggjarmálaráðið

Tað sær út til, at akkurát kunngjørda § 3 c í løgtingslóg nr. 19 frá 24. februar 2021 longu fer úr gildi 31. mars.

Um tit eru samd í hesum, mugu tit gera broyting í løgtingslóg nr. 190 frá 21. desember 2018 beinanvegin, um hetta ikki skal henda.

Tvs. at § 1, nr. 2 og § 2, stk. 3 í løgtingslóg nr. 190/2018 eigur at verða strikað innan 31. mars 2021.

Vinarliga

Nella Festirstein
Deildarstjóri

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan
Beinleiðis tlf: +298 55 80 76

Fra: Mortan Hentze <mortanh@tinganes.fo>
Sendt: 25. februar 2021 09:10
Til: Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>
Cc: Guðrið Dam Andreasen <gudrida@tinganes.fo>
Emne: Trupulleiki við meirvirðisgjaldslógini

Hey Nella

Haldi eg havi funnið ein trupulleika við meivirðisgjaldslógini.

Hendan broytingarlógin til meirvirðisgjaldslógina er júst sett í gildi:
https://logir.fo/Logtingslog/19-fra-24-02-2021-um-broyting-i-logtingslog-um-meirvirdisgjald-Meirvirdisgjaldslogin

Hon sigur at:

2. § 3 c verður orðað soleiðis:

"**§ 3 c.** Tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kann eftir umsókn fáa part av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. 1. pkt. er eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybrid akfør, PHEV.

Stk. 2. Í 2021 og 2022 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.

Stk. 3. Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein, skal motorakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024."

Hendan broytingarlógin til meirvirðisgjaldslógina er eldri:
https://logir.fo/Logtingslog/190-fra-21-12-2018-um-broyting-i-logtingslog-um-meirvirdisgjald-Meirvirdisgjaldslogin

Hon sigur í § 1, nr. 2 at § 3 c skal strikast tann 31. mars 2021.

Tað man helst ikki vera meiningin at tað skal ske nú.

Virðingarfylst / Kind Regards

Mortan Hentze
Lógasavnsmennari / Law Collection Developer

Løgmansskrivstovan / The Prime Minister´s Office
Lógartænastan / The Law Department
Fartlf. / Mobile Phone +298 55 80 71